ÚT AT KOYRA

Civic n‡tt design

Honda Civic kemur nú vi› n‡ggjum modellum. Íalt ver›a f‡ra útgávur at velja ímillum. Á myndini oman fyri er útgávan vi› 5 hur›um.

Kelda: FDM / Motor

Mercedes Coupé

Mercedes vil vera vi› at n‡ggi Mercedes C Coupé, ikki er bygdur yvir tann vanliga C-klassan, men er ein heilt n‡ggjur coupé.

Kelda: FDM / Motor

Mazda 323 facelift



Mazda 323 hevur fingi› n‡ggjan front, og líkist meira 626 modellinum. Eisini eru a›rar smærri broytingar.

Kelda: FDM / Motor

Luftdálking í Milano

Herfyri ste›ga›i øll bilkoyring í italska millíónb‡inum Milano, orsøkin var at luftdálkingin var blivin so ógvuslig. Politii› gav teimum i› ikki akta›u forbo›i›, stóra bót.

Kelda: Motor Magasinet

Ikki BMC, men BMW Mini

Bilar
Magnus Gunnarsson

Gamli Mini er uppaftursta›in sum ein nútímans bilur. Mini var ein kollvelting innan bilídna›in, tá hann av fyrstan tí› kom á markna›in í 1959, tekna›ur av Alec Issogonis. Ta› var BMC (British Motor Corporation) i› kom vi› Mini, men nú er ta› BMW sum kemur vi› næsta ættarli›i av Mini.

Mini í n‡ggjum sni›i. 15” hjólini klæ›a væl til bilin

BMW seldi ikki Mini

Upprunaliga var ta› Rover, sum er ein beinlei›is eftirkomari hjá BMC, i› byrja›u verkætlanina vi› n‡ggja Mini. Men Rover kom út í fíggjarligar trupulleikar, og fyritøkan bleiv seld til BMW, sum eftir nøkrum árum aftur seldi Rover til Phoenix í Onglandi. Teir seldu tó ikki Mini verkætlanina, og á bilaframs‡ningini í Paris, nú í oktober, var ein n‡ggjur framhjólstrektur BMW Mini s‡ndur fram. At ein BMW hevur framhjólstrekk, ver›ur ikki so væl dámt av øllum, men ein Mini vi› bakhjóstrekk hev›i heldur ikki veri› gó›tiki›. Har mátti BMW boyggja seg.

Í gamlan stíl

Hóast BMW Mini líkist tí gamla Mini, er hatta ein nútímans bilur, vi› allari n‡ggjari trygdarútger›. Ein stór broyting er støddin á hjólunum, sum á gamla Mini var 10”, og nú er 15”. Innan er nógv sum minnir um tann gamla, stórt speedometur í mi›uni á instrumentbor›inum og snúningsmátara á rættstammuni. Eisini liturin á bilinum, har taki› hevur ein annan lit enn restin av bilinum.

Sum á tí gamla er motorurin tvørliggjandi, og tríggjar støddir ver›a at velja ímillum, har allir eru 4 syl.16V og 1,6 litur vi› 90 hk, Cooper hevur 115 hk og Cooper S hevur 165 hk. Seinni koma væntandi fleiri útgávur vi› minni motorum.

D‡rur bilur

Ta› vísir seg at nakrir bilar, sum fólk hava tiki› sera væl ímóti, ikki sleppa at fara í søguna uttan ví›ari, sum til dømis VW Beetle, i› er VW Boblan í n‡ggjari útgávu.

Um BMW Mini ver›ur ein succes, er ringt at siga naka› um, tí príslegan hevur stóra ávirkan á søluna. Í Danmark ver›ur rokna› vi› at prísirnir fara at ver›a millum 235.000,- og 275.000,- krónur fyri hesar fyrstu útgávurnar, men væntandi koma bíligari útgávur seinni.

Aftan minnir hesin nógv um gamla Mini, eitt nú baklyktirnar og plaseringin av nummarplátuni

BMW Mini

Motorar	4 syl.16V og 90 hk Cooper 115 hk / Cooper S 165 hk
Stødd og vekt	
Longd	360,0 cm
Breidd	170,0 cm
Hædd	135,0 cm
Eginvekt	1000 kg



Innan er alt í gomlum stíli, vi› einum stórum speedometri í mi›uni og snúningsteljara á rættstammuni. Baksetrini hava nakkastu›lar, og paneli› á hur›unum er ógvuliga sermerkt

ÚT AT KOYRA

NSU og Mazda vi› Wankel-motori

NSU Spider frá 1963, var fyrsti bilur vi› Wankelmotori. Bilurin hev›i sama modell sum NSU Sport Prinz. Ta› eru nokk fleiri sum minnast at danski søluma›urin hjá Frants Restorff, Lykkegren, fer›a›ist kring landi› vi› einum rey›um NSU Sport Prinz. Tann bilurin hev›i ein 2 syl. f‡ratakt luftkøldan motor

BILAR
Magnus Gunnarsson

Nú eru nógv ár li›in sí›an vit seinast sóu ein bil í Føroyum vi› Wankelmotori, sum vit minnast frá Mazda bilunum fyri eini 20 til 30 árum sí›an.

Felix Wankel

T‡ski maskinverkfrø›ingurin, Felix Wankel, menti Wankelmotorin saman vi› NSU bilverksmi›juni. Í 1957 var fyrsti Wankelmotorur settur í gongd, og fyrsti NSU Spider vi› Wankelmotori kom á markna›in í 1963. Seinni kom NSU RO 80.Ta› vísti seg at ver›a nógvir tekniskir trupulleikar vi› Wankelmotorunum, serliga vi› at fáa tetningsringarnar á rotorinum at halda.

Wankelmotorurin

Wankelmotorurin hevur ikki stempul, sum arbei›a upp og ni›ur, ei heldur ventilar sum í vanligum motorum, men hava ísta›in tríkanta›ar rotorar, sum snúra eksentriskt runt í einum sergjørdum motorhúsa, ella kamari. Flestu Wankelmotorarnir høvdu 2 ella 3 kømur. Motorarnir kravdu líti› pláss í motorrúminum, og høvdu sera gott upptrekk. Wankelmotorarnir ljó›a›u sum V8 motorar, og vóru ikki sparnir vi› bensinn‡tsluni.

Mazda Wankelbilarnir

Vi› loyvi frá NSU, fór Mazda bilverksmi›jan í Japan at gera bilar vi› Wankel motori. Tann fyrsti var Cosmo Sport, sum kom í 1967, og í 1968 kom R-100 coupé. Hesir komu ongantí› handanvegin. Men í 1970 kom RX-2, i› hev›i sama karrossarí sum Mazda 616, og var fyrsti bilur vi› Wankelmotori í Føroyum. Seinni komu RX-3, RX-4 og RX-5. Her koyrdu teir gott, men orsaka av at vit ikki høvdu ta› rætta bensini, komu av og til kvøll skot úr útstoytinum. Hetta var á›renn vit fingu blífrítt bensin í Føroyum. Mazda hevur ongantí› slept Wankelmotorinum. Teir hava RX-7, eins og teir alla tí›ina gera royndir vi› prototypum. Nú er ætlanin at ein RX-8 skal koma á markna›in næsta ár, sum avloysari fyri RX-7. Annars hava a›rir eisini roynt seg vi› Wankelmotorum, so sum Citroën, Lada og Mercedes.

Betri motorar

Ein russiskur verkfrø›ingur, Andreij Kurochkins, sigur seg at hava loyst trupulleikarnar vi› at fáa tetningsringarnar á Wankelmotorinum at halda tætt. Eisini hevur hann gjørt Wankelmotorin meira orkusparandi.

T‡ski maskinverkfrø›ingurin Felix Wankel, (f.1902), konstruera›i Wankelmotorin í samstarvi vi› NSU bilverksmi›juna. Í 1957 var› fyrsti Wankelmotorur settur í gongd, men fyrsti bilurin, NSU Spider, kom á markna›in í 1963

Mazda RX-3 var sama model sum Mazda 818. Mazda merki› í kølaragittaranum, hevur sama form sum rotorurin í Wankelmotorinum. Bilin á myndini átti Jørgin Gunnarsson í sjeytiárunum. RX-3 vór›u gjørdir frá 1971-76



Wankelmotorurin hevur ongi stempul, men tríkanta›ar rotorar, i› snúra eksentriskt inni í kømurunum. Hesir motorar taka líti› pláss, og hava gó›a kraft

NSU RO 80, i› var› gjørdur frá 1968-77, bleiv ein tann best kendi bilurin vi› Wankelmotori, men hann hev›i nógvar tekniskar trupulleikar at dragast vi›